# Strandferðslan av Eystaru bryggju

**Við nýggju Norrønu á Eystaru bryggju í Havn, verður ikki pláss fyri Farmaleiðum hjá Strandferðsluni. Væntandi noyðast farmaleiðir at flyta niðan á Hjalla. Hetta er sera óheppið, sigur Heini á Borg, farmaflutningsleiðari hjá Strandferðsluni**

UMSKIPAN
*Orð: Heri á Røgvi*
*Myndir: Álvur Haraldsen*




*Soleiðis fer økið á Eystaru bryggju at síggja út í framtíðini eftir umskipanina. Leggi til merkis, at innkoyringin verður sum nú, men ferðafólk og onnur, ið skulu við ella eftir fólki í bussunum skulu parkera eystanfyri bygningin, ístaðin fyri vestanfyri sum nú. Alt økið vestanfyri verður nýtt til bilrøðirnar til Smyril og Norrønu. At ein bygningur verður rivin niður gevur eisini munandi meira pláss til avgreiðslu av bilunum, sum skulu við skipunum.*
*Tekning: Tórshavnar havn*

Komandi ár byrjar nýggja Norrøna at sigla. Hetta fer at merkjast og síggjast. Ongastaðni meira enn hjá Tórshavnar havn.

Nýggja Norrøna kann taka fleiri enn áttahundrað bilar. Sostatt mugu tey klóku høvdini hjá Tórshavnar havn til at finna útav, hvussu verður við øllum teimum mongu bilunum, sum skulu framvið Eystaru bryggju, áðrenn teir verða lovaðir umborð nýggjastu útgávuna av Norrønu.

Millum fylgjurnar er, at bygningurin, har Farmaleiðir halda til, verður rivin niður. Tað er saman bygningur, sum Farstøðin eisini húsast í, men hesin parturin av bygninginum verður verandi órørdur. Tað merkir so, at tann parturin av bygninginum, sum verður nýttur til transithøll verður mestsum óbroyttur og fer at verða nýttur stórt sæð sum nú.

### 1300 m2

Økið, sum Farmaleiðir hava á Eystaru bryggju, er 1.300 fermetrar til støddar. Heini á Borg, farmaflutningsleiðari hjá Strandferðsluni, kallar ætlaða stigið fyri sera óheppið fyri teir.

Strandferðslan og Farmaleiðir hava virkað á Eystaru bryggju í nógv ár, men nú sær tað altso út til, at tann tíðin er farin.

Strandferðslan er uppsøgd til hálvan desember, tá teir skulu vera úti úr bygninginum. Farmaleiðir, ið nýta teir 1.300 fermetrarnar, er partur av Strandferðsluni, men hevur serskildan roknskap fyri seg. Farmaleiðir taka sær av flutningi innanoyggja hjá Starndferðsluni. Sambært Heina á Borg so javnvigar roknskapurin hjá felagnum í løtuni, og teir eru ikki í beinleiðis kapping við nakran.

Heini á Borg sigur, at teir hava gjørt íløgur fyri einar tvær milliónir í bygningin hjá Farmaleiðum. Leigumálið við Tórshavnar havn er tó fyri fleiri ár fram. Heini á Borg roknar í hesum sambandi við, at teir fáa eitt ávíst endurgjald útgoldið frá Tórshavnar havn.

### Á Hjalla

Í staðin fyri hølini við Farstøðini hevur Strandferðslan fingið innivist í gamla pakkhúsinum hjá Eimskip. Talan er tó um eitt munandi minni øki. 460 fermetrar verða tøkir hjá Farmaleiðum at nýta, men hetta verður bert í eitt avmarkað tíðarskeið.

—Vit hava fingið at vita, at vit kunnu bert nýta tey hølini til endan av 2003, og eftir hetta hava vit ongastaðni at vera á Eystaru bryggju. Eisini noyðast vit at gera íløgur í hesi høli, og vit hava ongar pengar sett av til endamálið, sigur Heini á Borg.

Hin partin av bygninginum skal Smyril Line nýta. Eftir 2003 er mest sannlíkt, sambært havnafútanum, at Smyril fer at nýta allan tann bygningin, t.e. eisini tann partin, ið Farmaleiðir hava fingið ávíst sum er.

Eftir 2003 er tað væl hugsandi, at Farmaleiðir fara at halda til á Sandvíkarhjalla í Havn. Økið verður sum nú nýtt til ídnaðarøkið, og Tórshavnar býráð hevur samtykt at gera fleiri og umfatandi útstykkingar til ídnaðin.

—Tað ber til hjá okkum at broyta mynstrið, soleiðis at vit kunnu halda til á Hjalla, sigur Heini á Borg.

Hann vísir á, at teir flestu eindirnar hjá teimum eru mobilar, soleiðis at tað kann ber til at virka á Hjalla, men hann vildi nú heldur hildið til á Eystaru bryggju. Sjálvur heldur hann eisini ikki, at allar súðir eru syftar enn.

—Vit mugu royna at tingast við myndugleikarnar, sigur Heini á Borg.

### Umskipast

Jónsvein Lamhauge, havnarfúti hjá Tórshavnar havn, sigur, at alt hetta við at ríva bygningin niður og flyta Strandferðsluna er partur av einari umskipanarætlan, sum skal setast í verk fyri betri at kunna hýsa øllum – eisini nýggju Norrønu og nýggja Smyrli.

—Vit høvdu sera fegin viljað hýst teimum, um vit høvdu plássið, sigur Jónsvein Lamhauge, tá spurt verður, um viðferðin móti Strandferðsluni og Farmaleiðum kann tykjast órættvís.

—Vit verða noyddir at raðfesta, og vit meta, at Farmaleiðir kunnu klára seg við at halda til aðrastaðni, sigur Jónsvein Lamhauge.

Málið hevur, sambært Jónsveini, verið fyri í havnanevndini hjá Tórshavnar býráð, og har er semja um at fremja ætlaðu umskipanina.

Eftir ætlan verður alt økið vestanfyri verandi pakkhús hjá Eimskip og Skipafelagnum bert nýtt til ferðafólk í framtíðini.

Tað var í 1991, at bygningurin, sum nú hýsir Farmaleiðum og Farstøðini, byrjaði at hýsa sínum núverandi endamálið. Sum sagt verður ein stórur partur rivin niður fyri at skapa meira pláss. Í framtíðini koma bussarnir og fólk, ið skulu setast av við farstøðina, at steðga eystanfyri bygningin – heldur enn vestanfyri sum nú. Hetta ger, at munandi meira pláss verður fyri bilum til skipini. 250 pláss verða eftir ætlan á bryggjuni til bilar. Hetta eru eini hundrað fleiri enn í dag, men framvegis eini sekshundrað færri enn Norrøna kann taka umborð. Á myndunum á síðuni sæst, hvussu ætlaða umskipan verða framd í verki.

Í framtíðini verður eisini eitt pláss í bygninginum til farm. Talan verður um 250 fermetrar, sum Farmaleiðir fáa møguleikan at leiga, sigur Jónsvein Lamhauge.

Økta plássið til bilarnar, ið skulu við skipunum, gevur eisini størri rúm til avgreiðslu (check-in), soleiðis at gongur skjótari, tá skipini skulu lastast við bilum. Spurdur, um hetta nú er nóg mikið av plássi, svarar Jónsvein Lamhauge, at tað er ringt at siga, hvat er nóg mikið.



*Økið við Farstøðina á Eystaru bryggju, sum tað sær út í dag. Í framtíðini skal alt økið við støðini, sum sæst á myndini, nýtast til bilarøðini til nýggju Norrønu og nýggja Smyril.*

# ítróttur

Nr. 182 • týsdagur • 23. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Lesið eisini:
**Skytte á veg til HB**
síða 24



# Kurt gevst í Klaksvík




*- Sjálvur haldi eg, at fyrstu dystirnir vóru brúktir til at fáa leivdirnar frá ringu árunum burtur, sigur Kurt millum annað um kappingarárið, har KÍ í løtuni er tvey stig frá oddaliðnum*

**Sambært KÍ formannin, so syrgir bæði felagið og býurin um, at Kurt Mørkøre – í øllum góðum við KÍ – hevur gjørt av at flyta aftur til Noregs at búgva**

KÍ VENJARIN
*Jákup Mørk og*
*Jóannes Hansen*

Klaksvíkin og felagið syrgja. Hann helt sjálvur, at tað var kanska at taka í so rívan til at siga soleiðis, men tað var ikki at fara skeivur av. KÍ formaðurin, Gestur Hovgaard og KÍ harmast um, at tað nú er greitt, at Kurt Mørkøre flytir aftur til Noregs at búgva.

– Og øll, sum eg havi tosað við, og sum eru áhugað í fótbólti, harmast um, at Kurt nú hevur tikið avgerðina at flyta. Tað er heldur ikki so undarligt, tí Kurt hevur gjørt eitt megnararbeiði, síðani hann kom higar. Hann hevur givið spælarunum trúgv uppá, at tað ber til, og hann hevur megnað at skrúvað eitt gott og breitt lið saman, staðfestir KÍ formaðurin, sum samstundis ynskir Kurt Mørkøre alt tað besta í Noregi.

*Nær verður tað greitt, hvør skal venja KÍ komandi ár?*

– Vit hava bíðað eftir Kurt, og nú hevur hann tikið støðu. Vit eru longu farnir undir arbeiðið at fáa nýggjan venjara. Eg vóni, at tað arbeiðið verður liðugt um einar tvær vikur. Nýggi venjarin skal helst vera við til at fyrireika nýggja kappingarárið, so tað leypur eingin tíð av.

*Eru tit í tíðarneyð?*

– Tað haldi eg ikki. Vit hava ta fatan, at fleiri eru áhugaðir í at koma henda vegin, og vit ætla at gera so skjótt av, sum tað ber til, sigur KÍ formaðurin.

### Torført

Í síðstu viku skrivaðu vit, at Kurt skuldi gera upp við seg sjálvan, um hann fór at halda fram ella ikki. Eftir stórsigurin ímóti GÍ boðaði Kurt Mørkøre frá avgerðini, sum hann hevði tikið, og hon var, at hann eftir eitt ára venjaraarbeiði í barndómsfelagnum fer at flyta aftur til Noregs.

- Tað sigur seg sjálvt, at talan var um eina torføra avgerð. Ikki minst nú tað hevur gingist so væl hjá okkum í seinastuni. Men nú er avgerðin tikin, og tá teir báðir seinastu landskappingardystirnir eru farnir aftur um bak, fari eg aftur til Noregs, segði Kurt Mørkøre, tá vit mánamorgunin hittu hann á máli.

### Tung hugburðsbroyting

Stigatalvan sigur sína greiðu søgu um, at tað hevur gingist væl hjá KÍ seinastu nógvu umførini. Eftir eina sera soltna byrjan, har liðið millum annað ikki megnaði at koma víðari úr bólkaspælinum steypakappingini, og har fýra teir fyrstu dystirnir í landskappingini bert góvu trý stig, hevur tað bara gingið ein veg. Somikið væl hevur gingist, at KÍ ikki hevur tapt á føroyskari grund síðani í fjórða umfarinum í landskappingini.

Sum vera man, so er Kurt fegin um, at tað hevur eydnast at vent tungu gongdini, sum felagið hevur verið í seinastu árini.

- Sum tú sigur, so var byrjanin alt annað enn góð, men sjálvur haldi eg, at fyrstu dystirnir vórðu brúktir til at fáa leivdirnar frá vánaligu árunum burtur. Spælararnir skuldu fáa rætta hugburðin, og tað tekur tíð at fáa sovorðið upp á pláss. Tað skuldi bara vera so, at tað tók nakrar dystir, áðrenn hetta varð rættað, men síðani hevur tað gingið sera væl, og tað eri eg fegin um.

Men tá tit nú bara eru tvey stig frá oddasessinum, eru tað so ikki ein ella tveir dystir, sum tú nú kanst peika á og siga, at har og har mistu vit gullmerkini?

- Nei, soleiðis haldi eg ikki, at tú kanst venda tí. Sjálvandi eru tað dystir, har vit iðra okkum um, at tað ikki gekk betri, men hinvegin hava vit eisini havt hepnið við okkum onkra aðru ferð, so alt í alt hevur tað helst gingið nøkunlunda upp, heldur venjarin.

### Heldur fram

Sum sagt, so fer Kurt til Noregs, nú kappingin endar, men áðrenn vit sleppa honum heilt, verður spurningurin sjálvandi settur, hvørt royndirnar í ár hjá KÍ hava givið honum mót uppá at halda fram sum venjari.

- Heilt avgjørt. Nú er hetta so nýtt, so eg havi als ikki havt samband við nakran yvir í Noreg, men eg ætli mær so at vita, um eg ikki kann fáa onkran møguleika har yvir eisini, sigur Kurt Mørkøre at enda.